# Sjómannadagur vísir sjófólkum virðing

**Hóast tey ikki altíð eru so sjónlig, eru tað sjófólkini, sum í stóran mun halda okkara samfelag uppi, minti fiskimálaráðharrin, Bjørn Kalsø, á, tá hann setti Sjómannadagin 2007**

SJÓMANNADAGUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Í setanarrøðuni segði fiskimálaráðharrin millum annað, at hann kendi tað sum ein serligan heiður at sleppa at geva sítt íkast til hendan dagin, har hann kom so tætt at sínum málsøki og teimum fólkum, sum hava sítt gerandislív í fiskivinnuni.

## Avbjóðing

- Sjófólk hava í allar mátar uppiborið, at serligt ljós verður varpað á tey. Ein dagur, sum hesin, styrkir virðingina fyri sjóvinnuni, segði Bjørn Kalsø, fiskimálaráðharri.

Hann legði afturat, at hóast fiskiskapur er kjarnin í sjóvinnuni, so kann hann ikki standa einsamallur. Skal okkara sjóvinna fylgja við, má hon alsamt menna seg við betri skúling og trygd, meir framkomnum tølum og eftirmetingarskipanum.

- Eg vóni ikki, at tit, sum hava tykkara lív í sjóvinnuni, síggja hesi framtíðarkrøv sum eina hóttan, men heldur sum eina neyðuga og avbjóðandi menning av tykkara yrki, segði fiskimálaráðharrin.



*- Ein dagur sum hesin er avgjørt við til at knýta og styrkja bond innan sjóvinnuna, segði fiskimálaráðharrin, Bjørn Kalsø millum annað, tá hann setti Sjómannadagin 2007*

## Rætta umhvørvið

Við egningarskúrunum øðrumegin og Vánni hinumegin dugdi fiskimálaráðharrin illa at ímynda sær eitt betri hóskandi umhvørvi fyri Sjómannadagin enn júst Klaksvíkina og Stangabrúnna.

Eisini helt hann tað vera stuttligt at síggja, hvussu væl tað var eydnast fyrireikararnum at hava børnini við í ymsum, sum tey vaksnu vanliga takast við

- Tað er hugaligt at síggja, hvussu Sjómannadagurin megnar at ítøkiliggera nógv av tí, sum fyrr var ein sjálvfylgja, men sum nú er við at fara í gloymibókina, segði Børn Kalsø, fiskimálarráðharri millum annað, áðrenn hann lýsti Sjómannadagin 2007 at vera settan.





# Forvitnisligt fyri b

**Sjómannadagurin ger nógv fyri at hava børnini við í tí, tey vaksnu annars takast við**

SJÓMANNADAGUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Tey smáu gjørdu stór eygu, tá onkur av teimum størru var so djarvur at taka ein yvirvaksnan krabba upp úr einum av mongu kørunum við fiski og sjódjórum, sum vóru sett upp á Stongunum í Klaksvík.

## Børnini við

Allan leygardagin hingu børnini við nøsini tætt niður móti sjónum í kørunum við løgnu verunum. Spurningarnir flugu gjøgnum luftina, og tey vaksnu vóru fús at svara, sum frægast.

Sum fiskimálaráðharrin Bjørn Kalsø nevndi í setanarrøðuni, var tað stuttligt at síggja, hvussu væl tað er eydnast á Sjómannadegnum at hava børnini við í tí, tey vaksnu takast við.

Børnini høvdu longu havt sína egnu fiskikapping

*Tað kravdi sín lítla mann at tora at lyfta krabbar og annað upp úr forvitnisligu kørunum á Sjómannadegnum*